# VINNU SÍÐURNAR

Nr. 47 • mikudagur • 9. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Faroe Petroleum góðar vónir um framtíðina

**– Árið hevur verið framúr gott fyri felagið, við tað at vit framhaldandi menna leiti- og metingarvirksemi okkara. Vit hava styrkt um talið av leitimøguleikum, minkað um váðan og njóta ágóðan av at kunna seta eina boriverkætlan í verk eftir okkara egna tykki komandi tíðina. Møguleikarnir eru av alstórum týdningi fyri eitt lítið felag sum okkara, og vit fyrireika okkum til eina sera spennandi tíð fyri framman sigur Joe Darby, nevndarformaður í Faroe Petroleum í tíðindaskrivi frá felagnum**

*Oljufeløg*

Faroe Petroleum (móðurfelagið hjá Føroya Kolvetni P/F), ið er skrásett á bretska virðisbrævamarknaðinum AIM, ið er eitt oljufelag við høvuðs-denti á oljuleiting á Atlantsmótinum og í Norðsjónum, almannakunnger í hesum døgum úrslitið fyri 12 mánaðirnar fram til 31. desember 2004.




*Kortið vísir økini vestan fyri Hetland og við Føroyar, har Faroe Petroleum er við antin sum fyristøðufelag ella sum partnari*




*Kortið vísir hvar Faroe Petroleum nú hevur keypt seg inn í teig í Norðsjonum*

## Góð menningarúrslit av virksemi felagsins

- Í sambandi við 22. bretska útbjóðingarumfar fekk felagið tillutað 6 leitiloyvi vestan fyri Hetland við stórum menningarmøguleikum. Í tveimum av loyvunum er felagið einsamallur loyvishavi og fyristøðufelag, og fýra loyvir eigur felagið saman við BP, ChevronTexaco, OMV og Shell
  - 21 teigar og part-teigar, ið fevna um 3.456 km2 brutto
  - stórir møguleikar og nógv leitimið (prospekt)
  - 100% ognarpartur í Freya og Seonaid fundunum, ið liggja upp at Clair-oljufeltinum
- Í sambandi við annað føroyska útbjóðingarumfarið, í januar 2005, fekk felagið tillutað tvey leitiloyvi, eitt sum einsamallur loyvishavi og eitt saman við Statoil, DONG og Shell
  - 14 teigar og 3 partteigar, ið fevna um 2.900 km2 brutto
  - 100% ognarpartur í Rannvá leitiloyvinum(012) á størsta óboraða ryggi í Evropu.
- Fyrsta yvirtøka av leitiloyvi í Norðsjónum, í Outer Moray Firth. Halibut Horst leitiloyvi yvirtikið í februar 2005 frá Shell og Esso
  - 90% ognarlutur í tveimum teigum miðskeiðis millum Claymore og Blake oljufeltini

## Fígging

- Felagið hevur ongar inntøkur av leitivirksemi
- Rakstrarhall uppá kr. 2.1 mió. (2003: kr. 7.4 mió.)
- Tøkur peningurin kr. 132 mió. (2003: kr. 150 mió.), ið er nøktandi til at svara øllum skyldum og til at troyta nýggjar møguleikar

## Framtíðarvánir

*Framhald á næstu síðu*